# TEKNISKUR LEIÐARI TIL TVØROYRAR KOMMUNU

Brennir tú fyri at standa á odda fyri tekniska økinum,

og hevur tú tev fyri at starvast í einari politisku skipan?

-So hevur tú møguleikan at søkja spennandi starvið sum

tekniskur Leiðari í Tvøroyrar kommunu



**STARVIÐ**
Leiðarin er við til at mynda menningina av Tvøroyrar kommunu saman við býráðspolitikarum, leiðarum og starvsfólkum.

Tvøroyrar kommuna er ein framsøkin og virkisfús kommuna, ið miðar fyri at veita góða og skynsama tænastu. Tvøroyrar kommuna strembar fyri at veita borgarum og vinnulívi bestu umstøður fyri menning og framburð og leggja okur áherðslu á, at hetta verður gjørt í tøttum samstarvi *og við atlit* til ætlanir, sum kommunan hevur stungið út í kortið.

Hetta setir krøv til, at tekniski leiðarin saman við leiðarunum og starvsfólkunum stuðla býráðnum í ætlanini framhaldandi at menna kommununa til frama fyri borgarar og vinnulív.

**HØVUÐSUPPGÁVUR**
Høvuðsuppgávan hjá tekniska leiðaranum er at tryggja, høgt tænastustig, tíðarhóskandi umsiting, har dentur verður lagdur á nýhugsan, soleiðis at tekniska deild verður ein sjónligur partur av kommunalu fyrisitingini, ið veitur góðar tænastur til borgarar, vinnulív, politikarar og umsitingina.

Tekniski leiðarin stendur á odda fyri at leggja arbeiðið til rættis á teimum økjum, hann umsitur, og skal tryggja, at tey mál, sum býráðið hevur sett sær fyri, verða rokkin og verða framd innan fyri játtanarkarmarnar.

Tekniski leiðarin skal eisini tryggja, at kommunan kann taka við teimum avbjóðingum, sum liggja fyri framman á tekniska økinum.

**ÁBYRGDARØKIÐ**
- Dagligu leiðslu av tekniska økinum
- Fíggjarliga ábyrgd av tekniska økinum
- Eftirlit við verkætlanum
- Býar- og byggiplanlegging
- Málsviðgerð og fyrireiking av málum til politiska støðutakan
- Ráðgevi og skrivari í avvarandi nevndum
- Ábyrgd av bygningum og ognum hjá kommununi
- Umsita matrikul, umhvørvis- & náttúruverndarmál
- Umsita drekki- & spillvatnskipanir
- Megnar at ganga undan og veita ráðgeving til leiðslutoymið og býráðslimir
- Hevur evni at arbeiða í eini politiskari skipan.

**FØRLEIKAKRØV**
Umsøkjarar verða mettir eftir fakligum, leiðsluligum og persónligum førleikum.

**Umráðandi er, at tú:**
Tú skalt duga væl at samskifta bæði munnliga og skrivliga á føroyskum máli. Fyrimunur er um tú hevur leiðslu- og fyrisitingarligar royndir, og royndum frá líknandi økjum, sum tekniska deild umsitur.

Hevur viðkomandi langa ella miðallanga útbúgving, ella annað viðkomandi útbúgvingarstøði, saman við royndum og førleikum.

**PERSÓNLIGIR EGINLEIKAR**

***Dentur verður lagdur á, at tú:***
- hevur góð leiðsluevni og megnar at veita eina góða tænastu
- hevur høgt trúvirði og ert álitsvekjandi í øllum samstarvi
- dugir væl at samskifta og hevur slagmátt (gjøgnumslagkraft)
- kanst hava nógvar bóltar í luftini í senn og megnar at raðfesta
- megnar at arbeiða undir trýsti og at halda fast í røttum avgerðum
- dugir at skapa og røkja sambond
- hevur tøkniligar førleikar og vitan

**SETAN OG LØN**
Tekniski leiðarin er partur av leiðslu-toyminum hjá kommununi. Starvið er skipað undir teknisku nevnd, við tilvísing til kommunustjóran, sambært starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyrar kommunu.

Starvið verður sett tann 1. mai 2024, ella eftir nærri avtalu.

Starvið er fulltíðarstarv, og verður lønt sambært galdandi sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**UMSÓKN**
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fróða Mortensen, kommunustjóra, á telefon 781122 ella umvegis teldupost: frodi@tvoroyri.fo

Skrivlig umsókn, saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skal verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin **19. apríl 2024, kl. 12.00**.

*Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, revsiváttan og barnaváttan verður umbiðin til evt. samrøðu. Tvøroyrar kommunu tilskilar sær rætt til ongan umsøkjara seta og lýsa av nýggjum um mett neyðugt.*

